# sama leisti sum Vágatunnilin



*Hans Pauli Strøm, Bjarni Djurholm, Bjørn Harlou, Pál Weihe og Maria Róin skifta orð við tíðindafólk um eina føroyska granskarapark*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

skjótt til ber, soleiðis at arbeiðið við projektering og bygging kann verða boðið út – og somuleiðis, at stjóri verður settur, so virksemið fer í gongd sum skjótast.

Stýringsbólkurin mælir eisini til, at trý sonevnd granskingarprofessoratir innan lívtøkni verða sett við Fróðskaparsetur Føroya, og hesi skulu starvast í føroysku granskaraparkini.

– At enda mæla vit eisini til, at ílegugranskingin er komin upp á pláss, áðrenn granskaraparkin verður projekterað, tí vit meta, at hesin parturin saman við biotøknini hevur alstóran týdning fyri føroysku granskaraparkina, segði Maria Róin.

slitum innan nevndu fakøki og fer at viðvirka til, at føroyskar fyritøkur og vørur verða millum tær fremstu í altjóða høpi.

– Málið er eisini, at granskaraparkin verður eitt markamót millum verandi vinnu, hægri nám, granskingarumhvørvi og íverksetarar.

Hon segði, at málið er eisini, at parkin fær góðar umstøður at fáa ment hugskot og verkætlanir, har nýggjar fyritøkur síggja dagsins ljós og gerast burðardyggar, meðan aðrar fyritøkur brúka føroysku granskaraparkina til at menna seg og ganga nýggjar leiðir.

– Granskaraparkin skal draga til sín føroyskar og útlendskar granskarar og onnur við fakligum førleika og útbúgving frá hægri lærustovni, og somuleiðis skal parkin draga til sín váðafúsan kapital, bæði føroyskan og útlendskan, segði Maria.

## Alment partafelag

Ætlanin er, at føroyska granskaraparkin skal skipast við lóg sum alment partafelag, ið líkist leistinum við eitt nú Vágatunlinum.

Mælt verður til, at parkin verður bygd mitt í vitanarumhvørvinum í Føroyum, nevniliga á Debesartrøð.

– Bygningurin verður bygdur í tveimum ella trimum byggistigum, soleiðis at møguleiki er at leggja nýggj stig aftrat so hvørt, sum tørvur verður á tí.

Maria vísti á tilmælið hjá stýringsbólkinum um, hvussu bólkurin metir, at fíggjarligi partur kemur at síggja út.

– Vit hava mælt til, at játtaðar verða einar 7 miljónir krónur til forkanning og projektering av granskaraparkini, og síðan ávikavist 28, 24 og 18 miljónir krónur yvir trý ár til bygging. Somuleiðis hugsa vit okkum, at játtaðar verða 4 miljónir krónur til rakstur tað fyrsta árið og síðan 3 miljónir krónur um árið yvir trý ár, til raksturin verður sjálvfíggjandi.

Ætlanin er nevniliga, at virksemið hjá granskingarparkini skal verða sjálvfíggjandi, sum árini ganga.

## Virksemið í gongd

Maria segði, at stýringsbólkurin mælir til, at lógaruppskot um parkina verður orðað í næstum og verður lagt fyri løgtingið.

– Vit mæla eisini til, at felagið verður stovnað so



*– Granskaraparkin skal draga til sín føroyskar og útlendskar granskarar og onnur við fakligum førleika og útbúgving frá hægri lærustovni, og somuleiðis skal parkin draga til sín váðafúsan kapital, bæði føroyskan og útlendskan, segði Maria Róin undir framløguni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*